# Flokstingið liðugt - fyribils

*Flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum endaði leygarkvøldið við fundarfráboðanini, men kortini er ikki seinasta orðið sagt enn. Eykafloksting verður næsta leygardag um nýggja bygnaðin, sum starvsnevndin hevur skotið upp*



Sveinur Tróndarson

Floksting Tjóðveldisfloksins endaði leygarkvøldið - fyribils í hvussu er. Punktið á skránni, val av nevnd varð útsett til eykafloksting, sum er lýst at vera í Havn næsta leygardag.

Orsøkin til hetta er, at starvsnevndin hevur lagt fram uppskot um broytingar í bygnaðinum, men fundarfólkið metti ikki, at tey høvdu fingið neyðugu tíðina til viðgerðina av broytingaruppskotinum.

**Broytingar neyðugar**

Meginparturin av fundarfólkinum, sum hevði orðið, var samt um, at neyðugt er við broytingum í skipan floksins. Samanhangur er ikki ímillum starvsnevnd og tingbólkin og fyri at koma hesum trupulleika til lívs skeyt formaðurin, Óli Holm, upp, at starvsnevndin verður avloyst av einum floksleiðslu, sum er samansett av trimum ting- ella landsstýrislimum og tveimum ikki, sum ikki eru fólkavaldir.

Trupulleikin við uppskotinum var, sum sagt, skotbráið, men kortini tykist eingin ivi vera um, at tá uppskotið kemur til viðgerðar, verður undirtøka fyri tí.

Onkur kneysi var á vegnum, tí broytingin er sum vera mann stór, men lítil ivi tyktist verða millum tjóðveldisfólk, at hetta fer at vinna frama.

Fyrimunurin við nýggju skipanini, skilja vit, er, at flokkurin fær eitt greiðari ábyrgdarbýti, samstundis sum heimurin uttanfyri flokkin fær eina greiðari mynd av, hvør tað er sum myndar flokkin.

**Fullveldið og vælferð**

Eins og vanlig er á flokstinginum endaði eisini hetta flokstingið við eini fundarfráboðan. Fráboðanin staðfestir, at tað nú finst ein søguligur møguleiki fyri samanhaldi um fullveldi og vælferð.

Talan er ikki um eitt stríð móti dønum ella um eitt stríð millum føroyingar innanhýsis. Tí leggur flokkurin dent á, at flokkurin í fullveldismálinum arbeiðir fyri:

- treytaleysum fólkaræði
- fullari ábyrgd fyri vælferð fólksins
- fjølbroyttum vinnulívi og sjálvberandi búskapi
- rætti føryinga at samstarva við aðrar tjóðir á jøvnum føti

Flokstingið staðfestir, at búskaparliga støða landsins er sterkari enn nakrantíð til at vera støðiðundir einum sjálvberandi búskapi, at fullveldistilgongdin er væl fyrireikað og liggur í tryggum fólkaræðisligum karmi og at nú er bert eftir at fremja fólksins vilja í verki. Í sama andadrátti heitir flokkurin á allar føroyingar tvørtur um alddurs- og floksmørk at taka við hesum møguleika, sum nú stendur í boði, samstundis sum flokkurin mótmælir tí útrokning, sum donsku myndugleikarnir løgdu fyri føroyingar í sambandi við samráðingarnar 17. marts.

**Mál eru rokkin**

Hóast fullveldismálið er tað, sum fær mest umrøðu av øllum, so staðfestir flokkurin at onnur mál eru rokkin síðani samgongan fór til verka.

Avlagandi studningspolitikkurin er manaður í jørðina og nú er ein vinnupolitikkur stungin út í kortið, har greiðar linjur eru millum alment og privat.

Hóast tað í fyrstani sá út til at ganga øvugtan veg, eri pensjónirnar hjá øllum hækkaðar munandi. Marknatrætan við bretar er loyst, og oljuleiting stendur fyri framman. Harafturat staðfestir flokkurin at varisligar betringar eru gjørdar á flestu samfelagsøkjum.

Kortini eru mál, sum liggja á láni, staðfestir Tjóðveldisflokkurin. Íløgutørvurin er sera stórur innan heilsuverkið, skúlaverkið og samferðsluøkið. Flokkurin gongur á odda í fyri at raðfesta, so bertringar verða gjørdar í samsvari við búskaparligu orkuna í einum sjálvstøðugum Føroyum.

Økismenningarpolitikkurin má síggjast í verki í teimum málsøkjum, sum nevnd eru omanfyri. Til seinast staðfestir flokkurin, at nógvar ósemjur hava verið á arbeiðsmarknaðinum og neyðugt er at skapa álit millum fakfeløg og myndugleikar. Í løtuni eru sáttmálasettu lærararnir í verkfalli og flokkurin ásannar, at neyðugt er at fáa fólkaskúlan fullvirknan aftur beinanvegin, og heitir á partarnar um at fara aftur til samráðingar sum skjótast.

**Veitsla í kavaroki**

Tá fundurin var liðugur og fyrsta ørindi av tjóðsanginum sungiuð var flokstingið av á hesum sinni. Fólk fór at leita sær aftur til húsa, væl at merkja fyri at skifta í annan ham, tí eftir flokstingið var veitsla í húsunum hjá Sørvágs Húsmøðrafelag, har knappliga 100 fólk fóru til borðs um átta tíðina leygarkvøldið.

Hóast veðrið ikki var til vildar - flokstingsveður, kallaði onkur tað, tí tað er altíð keðiligt veður, tá floksting er - so var hýrurin á gestunum góður, og sangurin og dansurin gekk í Sørvági, til út á sunnunáttina

Næsta leygardag verður so eykafloksting, har bygnaðurin í flokkinum verður viðgjørdur.


**Vit takka Stjørnuni fyri gott og vælleikandi kappingarár.**

**Hjartaliga tillukku við føroyameistaraheitinum**



Sosialurin - 3111820

DAEWOO Í FØROYUM

P/f Esmar Simonsen
HØVUÐSSTUÐUL




# Søguligur møguleiki fyri samanhaldi

*Um vikuskiftið hevði Tjóðveldisflokkurin floksting í Sørvági og sum vanligt endaði flokstingið við einari fundarfráboðan, sum vit prenta í fullum líki niðanfyri*



Fráboðan frá flokstingi Tjóðveldisfloksins í Sørvági

Søguligur møguleiki fyri samanhaldi um fullveldi og vælferð

Flokstingið staðfestir, at fullveldismálið mangan verður lagt út sum eitt stríð ímóti dønum ella sum eitt stríð millum føroyingar innanhýsis. Tí leggur flokstingið dent á, at Tjóðveldisflokkurin í fullveldismálinum arbeiðir fyri:

- Treytaleysum fólkaræði
- Fullari ábyrgd fyri vælferð fólksins
- Fjølbroyttum vinnulívi og sjálvberandi búskapi
- Rætti føroyinga at samstarva við aðrar tjóðir á jøvnum føti

Flokstingið staðfestir:

- at føroyski búskapurin er sterkari enn nakrantíð til at verða støðið undir einum sjálvberandi samfelag.
- at fullveldistilgongdin er væl fyrireikað og liggur í tryggum fólkaræðisligum karmi.
- at nú er bert eftir at fremja viljan til fullveldið í verki.

Tjóðveldisflokkurin heitir á allar føroyingar, tvørturum øll floks- og aldursmørk, at taka við tí søguliga møguleika, sum stendur okkum í boði.

Tjóðveldisflokkurin mótmælir teirri ósømiligu útrokning um kostnaðin av føroyingum í Danmark, sum leggur upp til eitt stríð millum fólkini, heldur enn sømiligar samráðingar millum politisk umboð.

Flokstingið staðfestir, at nógv stórmál eru loyst í samgonguskeiðnum higartil. Eitt nú:

- Avlagandi studningspolitikkurin er manaður í jørðina.
- Ein nýggjur vinnupolitikkur er stungin út í kortið, har greiðar linjur eru millum alment og privat.
- Hóast byrjunartrupulleikar og ørkymlan eru pensiónirnar hjá øllum hækkaðar munandi
- Marknatrætan við bretar er loyst og oljuleiting stendur fyri framman
- Varisligar betringar eru gjørdar á flestu samfelagsøkjum

Kortini má ásannast, at stórmál liggja á láni at loysa:

- Íløgutørvurin er stórur innan heilsuverkið, skúlaverkið og samferðsluøkið. Tjóðveldisflokkurin gongur á odda fyri at raðfesta, so betringar verða gjørdar í samsvari við búskaparligu orkuna í einum sjálvstøðugum Føroyum.
- Økismenningarpolitikkurin má síggjast í verki - innan skúla, samferðslu, samskifti og aðrar almennar tænastur
- Ósemjur hava verið á arbeiðsmarknaðinum, og neyðugt er at skapa álit millum fakfeløg og myndugleikar. Í løtuni eru sáttmálasettu lærararnir í verkfalli. Flokstingið ásannar, at neyðugt er at fáa fólkaskúlan fullvirknan aftur beinanvegin, og heitir á partarnar um at fara aftur til samráðingar sum skjótast.

Í Sørvági, 1. apríl 2000

**Floksting Tjóðveldisfloksins**

## Viðgera fólksligu viðurskiftini

Undir heitinum *Fólksligu viðurskiftini ríkispartarnar Danmark og Føroyar ímillum, nú og komandi* verður kafékvøld í Føroyahúsinum fríggjakvøldið hin 7. apríl klokkan 21-24.

Ole Wich lesur úr egnum yrkingasavni "Ophav" (Fannir 1996). Síðani verður í fólksligum ljósi kjakast um at verða dani í Føroyum og føroyingur í Danmark. Høvið verður at seta spurningar og eisini at syngja í felag — bæði á føroyskum og donskum. Tiltakið er fólksligt, heldur enn partapolitiskt. Tí eru eisini umboð fyri danska og føroyska Norrønafelagið boðin við.

Tey luttakandi eru:

**Ole Wich**, yrkjari og dani, sum leingi hevur búð í Føroyum

**Elin Heinesen**, webredaktørur World On-line og føroyingur, sum leingi hevur búð í Danmark

**Peter Jon Larsen**, aðalskrivari í Foreningen Norden Danmark

**Birgir Kruse**, lesandi í Danmark og skrivari í Norrøna Felagnum í Føroyum

Atgongugjald: 25,- kr


